UTTAN ÚR HEIMI

# Á knæ fyri pávanum



*Bæði núverandi og fyrrverandi ríkis- og stjórnarleiðarar úr øllum heiminum komnir til Rom at fylgja Jóhannesi Páll páva til gravar í morgin. Amerikonsku umboðini komu mikudagin, og her síggjast George W. Bush, forseti, Laura Bush, George Bush, fyrrverandi forseti, Bill Clinton, fyrrverandi forseti, og Condoleezza Rice, uttanríkisráðharri í Pæturskirkjuni*

*Mynd: Reuters*

# Reyð/grønur meiriluti í Noregi

**Hevði stórtingsval verið í Noregi nú, hevði Jens Stoltenberg komið í forsætisráðharrasessin**

NOREG
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er einki at ivast í, at hýrurin verður góður á landsfundinum hjá norska Arbeiðaraflokkinum um vikuskiftið, tí veljarakanningar benda týðiliga á, at flokkurin kann fáa stjórnarvaldið aftur, tá val verður í heyst.

Tann seinasta kanningin bleiv almannakunngjørd í gjár, og hon vísir, at Arbeiðaraflokkurin, Sosialistiski Vinstraflokkurin og Miðflokkurin høvdu fingið 90 av teimum 169 stórtingslimunum, var val nú. Arbeiðaraflokkurin fær 28,1 prosent, sum er 0,9 prosentstig meiri enn fyri einum mánað síðani. Størstu framgongdina hevur SV, sum fær 3,2 prosentstig afturat og fær 17,7 prosent.



*Var stórtingsval í Noregi nú, hevði Jens Stoltenberg tikið við sum forsætisráðharri.*

Teir tríggir flokkarnir, sum mynda núverandi stjórnina, Høgri, Kristiligi Fólkaflokkurin og Vinstri høvdu fingið 45 tingmenn, var val nú. Framburðsflokkurin, sum stuðlar verandi stjórn, hevði fingið 34 umboð í Stórtingið.

# Næsta bókin er tann besta

**J.K. Rowling er nú liðug við ta sættu bókina um Harry Potter, og hetta er tann besta, sigur hon**

BÓKMENTIR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

J.K. Rowling (á myndini) er nú liðug við ta sættu bókina um Harry Potter. Bókin eitur "Harry Potter and the Half Blood Prince", og sjálv heldur høvundurin, at hon er tann besta. Hon leggur afturat, at í hennara eygum er tað ikki so umráðandi, hvat onnur halda um tað, sum hon skrivar.



– Tað týdningarmesta er, at eg eri nøgd við tað, sum eg skrivi, tí tað er fyritreytin fyri, at onnur kunnu vera nøgd, sigur tann væl umtókti høvundurin við blaðið The Sun.

Tann sætta bókin um Harry Potter kemur út á enskum tann 16. juli, men væntandi mugu teir trúgvu lesararnir bíða eitt sindur longri eftir teirri sjeyndu. Á nýggjárinum gjørdist J.K. Rowling mamma fyri triðju ferð, og nú ætlar hon sær at brúka meiri tíð til mannin og børnini, sigur hon.

## Gandhi til palestinar

Nøkur amerikonsk friðarfólk við filmsleikaranum Ben Kingsley á odda vóna nú, at ein arabisk útgáva av filminum "Gandhi" skal eggja palestinum til at gevast við harðskapinum.

Ben Kingsley spældi sjálvur høvuðsleiklutin í filminum, sum er frá 1992. Nú hava hann og onnur gjørt eina arabiska útgávu av filminum við hjálp frá 129 palestinskum sjónleikarum. Men teir fyrstu palestinararnir, sum hava sæð filmin, ivast í, at hann fer at hava ta ætlaðu ávirkanina, tí tey halda ikki, at frælsisstríðið í India kann samanberast við stríðið ímillum palestinar og Ísrael. Tey halda, at høvdu palestinar nýtt somu friðarligu framferð sum Gandhi, høvdu ísraelsmenn havt ognartikið alt palestinskt lendi fyri langari tíð síðani.

Handilsmaðurin Kamran Elahian, sum hevur verið við til at fíggja ta arabisku útgávuna av filminum, væntar kortini, at nógvir palestinar verða ávirkaðir av filminum.

## Tað var oljan

Leiðarin hjá ST-vápnaeftirlitsmonnunum í Irak, sviin Hans Blix, segði mikudagin á einari ráðstevnu í Stockholm, at oljan var høvuðsorsøkin til, at amerikanararnir gjørdu av at leypa á Irak.

Blix segði, at USA er sera heft at olju úr útlondum, og at krígið hevði til endamáls at tryggja USA nóg mikið av olju, um tað skuldi hent, at kappingin á marknaðinum bleiv ov hørð. Ein onnur orsøk var, at USA máti finna eina grund til at taka sítt herfólk úr Saudiarabia.

Hans Blix hevur fleiri ferðir funnist at USA, síðani hann fór frá sum ST-embætismaður fyri aldur í fjør, og hann hevur eisinim skrivað eina bók um arbeiðið at avvápna stýrið hjá Saddam Hussein.

## Verður ikki høgt upp

Ætlanin var, at tað stóra norska ferðamannaskipið SS "Norway" skuldi høggjast upp, men tann ætlanin er nú slept.

Seinastu átjan mánaðarnar hevur tað 43 ára gamla skipið ligið við bryggju í Týsklandi, har tað er vorðið umvælt eftir skaðan, sum tað fekk av einari spreinging í mai í 2003. Tá kom eldur í skipið, og átta av manningini doyðu. Ætlanin var, at skipið skuldi høggjast upp, men týsku myndugleikarnir hava sett seg upp ímóti tí, tí fleiri heilsuskaðilig evni so sum asbest eru í tí.

Tí hava eigararnir slept ætlanini um at høggja skipið upp, og tað skal nú togast til Malaysia, skrivar Aftenposten. Fleiri feløg hava boðið sær til at keypa skipið og at umbyggja tað til eitt flótandi hotell, men tað hevði eftir øllum at døma verið ov dýrt.

SS "Norway" var í mong ár flaggskipið hjá reiðarínum Norwegian Cruise Line og sigldi tá ímillum Miami og oyggjarnar í Karibiska Havinum.

## Eastwood á Iwo Jima

Tann júst Oscar-heiðraði amerikanski filmsleikstjórin Clint Eastwood ætlar sær at gera ein film um bardagan ímillum amerikanarar og japanar um oynna Iwo Jima undir seinna heimsbardaga. Bardagin var sera harður og kostaði 7.000 amerikonskum og 20.000 japonskum hermonnum lívið.

Iwo Jima er undir japonskum ræði, og mikudagin hitti Clint Eastwood umboð fyri japonsku myndugleikarnar, har hann bað teir um loyvi at taka filmin upp á oynni. Japanar eru ikki serliga fegnir um ætlanina. Teir siga, at nógvir hermenn, sum fullu á oynni, vórðu ongantíð funnir aftur, og tí krevja teir, at amerikanska filmsliðið skal geva monnunum gravarfrið. Clint Eastwood hevur lovað at vísa virðing fyri teimum falnu.

Tann nýggi filmurin verður gjørdur eftir bókini "Flags of Our Fathers: Heroes of Iwo Jima", og gongst eftir ætlan byrja upptøkurnar seinni í ár.